

*- Bankarnir sviku, og fíggjareftirlitið sveik. Øll, sum vóru ókritisk, sviku, eisini fjølmiðlarnir, segði Steingrímur J. Sigfusson, íslendskur fíggjarmálaráðharri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi og Steingrímur J. Sigfusson, íslendskur fíggjarmálaráðharri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Stóra arbeiðsloysi gjørdist eitt óvanligt fyribrigdi hjá okkum, sum vit ikki hava upplivað í nýggjari tíð

STEINGRÍMUR J. SIGFUSSON

helt eisini, at tað vóru akademikarar sum komu við teorium, ið ikki vístu seg at halda.

– Bankarnir sviku, og fíggjareftirlitið sveik. Øll, sum vóru ókritisk, sviku, eisini fjølmiðlarnir, segði Steingrímur J. Sigfusson.

Hann legði aftrat, at Altingið setti niður ein granskingarbólk at gera sínar metingar av tí, sum hendi, bæði politiskt, vinnuliga og moralskt.

– Eg haldi, at tað hevði verið áhugavert hjá føroyingum at hoyrt ein fyrilestur um tað, sum bólkurin kom eftir, og eg haldi, at ein slíkur fyrilestur kundi havt stóran áhuga, um hann eitt nú varð hildin í Norðurlandahúsinum í Føroyum, segði hann.

Hetta segði fíggjarmálaráðharrin, tí hann helt, at tað eru nøkur viðurskifti í Íslandi og Føroyum – í nýggjari tíð - sum líkjast, tá ræður um búskaparligu kreppuna, tó at kreppan í Íslandi er av eini heilt aðrari støðd enn í Føroyum.

– At bankasektorurin í Íslandi gjørdist 10 ferðir so stórur sum landsins búskapur, gjørdist okkara bági, legði Steingrímur J. Sigfusson aftrat.

## Ábyrgdarkenslan

Hann vísti á, at nú hálvt triðja ár er liðið, síðan Íslandi rendi seg í búskaparliga ódnarveðrið, hevur landið framvegis stórar trupulleikar at dragast við.

– Tað eru bara vit sjálvi, sum kunnu loysa hesar trupulleikar, og tað eru bara vit, sum ikki kunnu gera tað. Hetta snýr seg um ábyrgd, og tað eigur ongantíð at vera trupult at gera tað, sum tú heldur vera rætt og neyðugt. Gera vit ikki tingini nú, hava vit onga sosiala vælferð um fimm ár, segði hann.

Steingrímur J. Sigfusson segði, at hansara uppgáva eisini er at ansa eftir vælferðini – og at tryggja framtíðina hjá íslendsku tjóðini.

Steingrímur J. Sigfusson vísti eisini á tað havríkidømi, sum londini í útnorði sita á.

– Her er nógv tilfeingi – ikki bara til okkum sjálvi, men eisini til onnur. Vit hava so nógv av tí, sum øðrum vantar úti í heimi. Eg haldi, at londini í útnorði hava eitt gott grundarlag at byggja sína tilveru á, legði hann aftrat.

Hann helt, at londini skulu trúgva upp á framtíðina, tó at brotasjógvar hava verið yvir okkum seinastu árini.

– Samfelagið skal ikki stagnera ov leingi. Tað krevst, at teir flokkar, sum trúgva upp á framtíðina, halda saman og samstarva. Eg ynski Tjóðveldi blíðan byr og stórar sigrar á komandi valum, og eg trúgvi, at Føroyar hava brúk fyri hesum.

## Fleiri í skúla

Tá íslendski fíggjarmálaráðharrin varð liðugur við sína framløgu, vórðu spurningar settir honum.

Fólk, sum umboðaðu Unga Tjóðveldi á flokstinginum, vildu eitt nú vita, hvussu kreppan hevur gingið útyvir viðurskiftini hjá ungdóminum.

Steingrímur J. Sigfusson segði, at arbeiðsloysið í Íslandi gjørdist søguliga høgt, tá landið rendi seg í hesa sváru kreppu.

– Arbeiðsloysi av hesi støddini gjørdist eitt óvanligt fyribrigdi hjá okkum, sum vit ikki hava upplivað í nýggjari tíð.

Hann segði, at til tess, at ungdómur ikki skal ganga arbeiðsleysur og keða seg, hava tey gjørt tað møguligt at lata tey, sum ikki hava høvi at arbeiða, sleppa at ganga í skúla í staðin.

– Tað ringast, sum kann henda fyri ungdómin, er, at hann steðgar upp. Her eru kanska serliga tey í vandabólki, sum búgva heima og ikki nýtast at gera nakað fyri at fáa dagin at hanga saman, segði Steingrímur J. Sigfusson, íslendskur fíggjarmálaráðharri.

vilmund@sosialurin.fo